Álit

í

løgtingsmáli nr. 47/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (Broyting av allýsingini av lendisakførum, atgongd til upplýsingar úr Akfarsskránni, umbýtan av bretskum koyrikorti til føroyskt koyrikort, broyting í heimildunum hjá landsstýrismanninum viðvíkjandi tryggingarskyldu og broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt málið fram tann 4. november 2020 og eftir 1. viðgerð tann 17. november 2020 tann er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 30. november og 2. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Eyðun Ljósheim, umboð fyri Trygd og Betri Trygging og landsstýrismannin í fíggjarmálum saman við Akstovuni.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Christian Andreasen, Frimodt Rasmussen, Erhard Joensen, Steffan Klein Poulsen og Ingilín D. Strøm) tekur við einum broytingaruppskoti undir við málinum.

Meirilutin hevur ymiskar viðmerkingar.

Ingilín D. Strøm metir broytingina av allýsingini av lendisakførum vera ein spurning um ferðslutrygd. Í verandi støðu er heimild ikki til at døma fólk, ið koyra ávirkað á lendisakførum. Hetta er sjálvsagt ikki nøktandi og krevur broyting. Sama ger seg galdandi viðvíkjandi broytingini, ið snýr seg um, at viðskiftafólk kunnu geva avboð sama dag, sum tey skulu møta til skoðan ella umskoðan, uttan at Akstovan krevur eitt eyka gjald. Viðvíkjandi bretskum koyrikortum, ið skulu kunna býtast um til føroysk koyrikort, verður galdandi rættarstøða varðveitt, eftir at Stóra Bretland er farið úr ES.

Tá tað snýr seg um atgongd til akfarsskránna, hevur Dátueftirlitið í hoyringarskrivi víst á, at tað er neyðugt seta trygdartiltøk í verk at forða fyri, at óviðkomandi fáa atgongd til persónsupplýsingar, ella at tær verða misnýttar. Viðgerð av persónsupplýsingum fer fram eftir persónsupplýsingarlógini, og eftir 1. januar 2021 dátuverndarlógini. Akstovan hevur undir nevndarviðgerðini upplýst, at gongd er sett á at gera dátuviðgerðaravtalur við partarnar um viðgerð av upplýsingum, herundir serliga persónsupplýsingum, og at nøktandi trygdartiltøk verða sett í gildi og í verk fyri at forða fyri, at óviðkomandi fáa atgongd til persónsupplýsingarnar.

Christian Andreasen, Frimodt Rasmussen, Erhard Joensen, Steffan Klein Poulsen og Ingilín D. Strøm hava herumframt hesar viðmerkingar:

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur undir nevndarviðgerðini gjørt vart við, at Landsgrannskoðanin av misgáum vantar ímillum teir myndugleikar, sum sambært § 11 b, stk. 1 eiga at fáa lógarásetta atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni.

Meirilutin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, nr. 5 verður í § 11 b, stk. 1 aftan á nr. 5 sett:

"6) Landsgrannskoðanin,"
Nr. 6 og 7 verða eftir hetta nr. 7 og 8.

Viðmerkingar:
Landsgrannskoðanin hevur sambært § 21, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum o.a. heimild at krevja allar tær upplýsingar og øll tey skjøl, sum eru av týdningi fyri at útinna starvið. Sum er, hevur Landsgrannskoðanin atgongd til upplýsingar úr akfarsskránni um akfør hjá landinum. Við broytingaruppskotinum verður atgongdin hjá Landsgrannskoðanini til hesar upplýsingar tilskilað í ferðslulógini.

Við hesi broyting tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg og Hervør Pálsdóttir) tekur undir við broytingunum í ferðslulógini, burtursæð frá broytingini um at geva fleiri stovnum og fyritøkum atgongd til akfarsskránna. Løgtingið hevur fleiri ferðir umrøtt at geva uppaftur fleiri stovnum og fyritøkum atgongd til akfarsskránna, men hetta er ongantíð samtykt. Mett hevur verið, at heimildin gongur persónliga frælsinum ov nær, og at tað er neyðugt at vísa varsemi, tá tað snýr seg um at geva atgongd til almennar skráir. Tískil skjýtur minnilutin upp at broyta lógaruppskotið soleiðis, at § 11 b, sum snýr seg um at víðka skaran av teimum, sum fáa atgongd til akfarsskránna, verður strikað.

Minnilutin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 5 verður strikað.
   § 1, nr. 6 – 22 verða eftir hetta nr. 5 – 21.

2. § 2, stk. 2 verður strikað.

3. §§ 3 – 6 verða strikaðar.

Viðmerkingar:
Við at strika § 1, nr. 5 (§ 11 b) verður ítøkiliga heimildin í uppskotinum um elektroniska atgongd til skrásettar upplýsingar í akfarsskránni strikað, og galdandi rættarstøða verður varðveitt. Tað vil siga, at sambært ferðslulógini eru tað bara tær kommunalu tilbúgvingarnar í Føroyum, sum hava atgongd til upplýsingar úr akfarsskránni. Haraftrat hava allir undirsjóvartunlarnir sambært serlógum rætt til at fáa upplýsingar frá Akstovuni um skrásettar eigarar/brúkarar av akførum til tess at eftiransa

gjaldsstaðnum. Somuleiðis hevur Vága Floghavn rætt til at fáa upplýsingar frá Akstovuni um ein avmarkaðan skara av akførum við at upplýsa nummarspjaldur við tí endamáli at krevja inn gjald fyri nýtslu av parkeringsøkinum. Aðrir myndugleikar og stovnar hava av eftirlitsávum eisini atgongd til upplýsingar úr akfarsskránni sambært serlógum.

Broyting nr. 2 og 3 eru avleiddar broytingar av broyting nr. 1 og snúgva seg um at strika heimildina hjá landsstýrismanninum at seta umrøddu serlógirnar úr gildi.

Við hesum broytingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 8. desember 2020

Christian Andreasen formaður	Ingilín Didriksen Strøm næstformaður	Frimodt Rasmussen
Erhard Joensen	Steffan Klein Poulsen	Sirið Stenberg
	Hervør Pálsdóttir	